## Sogin úr flogfari

Hóast hann hekk hálvur út av einum flogfari í 8000 metra hædd, eydnaðist tað óhepna manninum at bjarga sær inn í flogfarið aftur. Hendingin fór fram í einum sjúkraflogfari yvir Amerika, har ein 41 ára gamal sjúkrarøktarfrøðingur varð sogin út til vindeygað, tá ið tað brádliga brotnaði. Flogskiparin valdi at lenda á nærmasta flogvølli, og óhepni maðurin varð síðan fluttur á sjúkrahús, har hann fekk 13 pentir fyri at hava skorið seg av brotna rútinum.



## Sandvíkingar fáa sparkivøll

Nú fáa eisini børnini í Sandvík sparkivøll frá Fótbóltssambandinum og UEFA. Og tað verður longu í heyst, at eisini børnini norðast í Suðuroy fáa graslíki undir gaggurnar. Hvalbiar Kommunar hevur søkt um at fáa tveir sparkivøllir og hevur fyribils fingið tilsøgn um at fáa ein. Á bygdaráðsfundi í Hvalba í gjárkvøldið varð samtykt at leggja hann í Sandvík. Málið hevur skund, tí fólk koma til landið í august-september at leggja graslíki á sparkivøllir og tá skal stykkið í Sandvík vera klárt. Tí er ætlanin at leggja vøllin á skúlastykkið, sum frammanundan er drenað og asfalterað. Nú verður farið í holt við at gera gyrðinginga rundanum og at gera stykkið heilt klárt at leggja vøllin á.

# Sløsa við váttanum

**Tað hendir javnan, tá Fiskiveiðieftirlitið kannar skipini, at partar av manningini ikki kunnu vísa fram heilsuváttan og trygdarskeið. Og tað er líkasæla, siga bæði skiparin á Brimli og Elmar Højgaard frá Fiskiveiðieftirlitinum**

SJÓVINNA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*40-tons línubáturin Fiskimúli úr Klaksvík er bert seinasta dømi um manningar, sum ikki leggja lag í kunngerðina um heilsuváttan og trygdarskeið. Eingin av manningini kundi vísa hesar váttanir fram, tá menn frá Brimli vóru umborð. Heldur ikki var manningin mynstrað*

*Mynd: Oliver Joensen, Skipalistin*

Alt ov ofta kemur tað fyri, at upp í fleiri av manningini á skipi ikki hava heilsuváttan og trygdarskeið. Hetta er nakað, sum Fiskiveiðieftirlitið javnan rennur seg í, og tað greitt brot á kunngerðina um mynstring.

Skiparin á Brimli sigur, at ein av stóru trupulleikunum í hesum sambandi helst er, at fyri nøkrum árum síðani varð mynstringarmyndugleikin fluttur frá løgregluni til skiparan. Og við tí troti á fólki, sum skipini nú byrja at merkja, førir hetta ofta til, at leysir menn, sum kanska bara koma ein túr oman á keiina, verða tiknir umborð.

- Skal skipið avstað um kvøldið, so hevur skiparin ikki stundir at bíða til dagin eftir fyri at finna mann við neyðugt váttanunum, og so verður bara farið við manning, sum fyri hondini er, sigur skiparin á Brimli.

Vanliga er tað tó so, at tað bert er ein partur av manningini, sum ikki hevur neyðugu váttanirnar í lagi, men vaktarskipini renna seg eisini í meiri grell dømir. Í síðstu viku vóru menn frá Brimli umborð á 40 tons línubátinum Fiskimúla úr Klaksvík, at har vísti tað seg, at ikki ein tann einasti av manningini kundi vísa fram hvørki heilsuváttan ella trygdarskeið. Hartil kom so, at manningin heldur ikki var mynstrað.

Brimil tók Fiskimúla og rak hann til lands, har hann slapp at leggja veiðina upp. Málið er síðani latið fútanum at støðutakan.

### Líkasæla

Tað eru nú longu fleiri ár síðani, at tað kom inn í kunngerðirnar, at fólk skuldu hava bæði heilsuváttan og trygdarskeið fyri at sleppa til sjós.

At byrja við var stórt trýst á trygdarskúlanum í Klaksvík, tí tá skuldi alt tað siglandi fólkið framat at taka hesi skeið. Men Elmar Højgaard á Fiskiveiðieftirlitinum heldur ikki, at tað er orsøkin til, at fleiri sjómenn framvegis ikki hava tikið hesi skeið.

- Tað kann ikki vera annað enn líkasæla. Tí talan er ofta um menn, ið hava siglt í fleiri Harrans ár, og tað ber ikki til, at teir skulu hava verið so óhepnir, altíð at verða skupmaðir afturum í køini. Vit hava so ikki merkt nakran serligan trupulleika í so máta við okkara egna fólki, sigur Elmar Højgaard.

Leiðarin á Trygdarmiðstøðini, Marjus Magnusson, er farin í summarfrí, men úr Klaksvík siga tey, at tað gaman í er eitt ávíst trýst á hjá teimum, men at menn kortini ikki bíða í áravís at sleppa framat.

Hinvegin er okkurt, sum bendir á, at fútin heldur ikki er so íðin at fylgja ásetingunum í kunngerðini um heilsuprógv og trygdarskeið umborð á skipi. Skiparin á Brimli heldur í hvussu er ikki, at hann hevur sæð nógv aftur til tey mál, sum latin eru fútanum í sambandi við manglandi váttanir hjá sjófólki.

- Tað stendur beinleiðis í kunngerðini, at hava sjófólk ikki neyðugu váttanirnar, so verður hetta revsa við bót. Men tað haldi eg lítið sæst til, sigur skiparin á Brimli við Sosialin.

# 30 hval í Sandágerði

**Ein lítil grind legði beinini í Sandágerði í gjárkvøldið. Kvart skinn varð í part.**

GRINDADRÁP

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Um 8-tíðina í gjárkvøldið sóu nólsoyingar grind í fjørðinum suðuri móti Tjørnunesi. Einir fýra bátar vóru skjótt hjá grindini, men ikki fyrr enn bólkurin var komin inn móti Argjalandinum, høvdu menn rættiliga varnast, at grind var í fjørðinum.

Sera væl gekst at reka, og sjálvt drápið gekk eisini skjótt fyri seg. Longu hálvanannan tíma eftir, at menn komu til grindina, var alt yvirstaðið, og nólsoyarbátarnir komnir til húsa aftur.

Hóast havnarmenn vóru seinir, so náddu teir kortini at vera við í drápinum, og tá avtornaði var ikki so lítið av fólki í Sandágerði.

Jens Marius Poulsen, býarstjóri, upplýsti, at talan gjørdist um 30 hval, sum vóru merktir til 242 skinn. Býtt varð í 564 drápspartar, og tað gav kvart skinn til hvønn. Hartil fingu nakrir stovnar burturav, umframt vanligu partarnar til metingarmenn, sýslumannin, grindaformenn, skaðasýnismenn umframt sjálvandi finningarfiskin, sum í hesum førinum fór til Nólsoyar.

Seðlarnir komu út klokkan trý í nátt, og tíðliga í morgun var alt longu fingið til høldar. Hetta er fyrsta grindin í Sandágerði, síðani 14.september í fjør.



*Grindin, sum legði beinini í Sandágerði í gjárkvøldið, taldi bert 30 hval Kortini varð eitt kvart skinn í part til drápsmenninar*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*